HAVNAR SVIMJIFELAG 35 ÁR

Lokaður svimjihylur størsta ynski hjá Havnar Svimjifelag



Áhugin fyri svimjing hevur verið og er stórur — ikki minst hjá børnunum.

Tað var á heysti í 1938 at fólk í Havn tóku seg saman til stovnan av svimjifelag og 8. september sama ár varð felagið stovnað.

Felagið virkaði í nøkur ár ikki torført. Tey tóku væl undir og teknaðu seg fyrt tilsamans at arbeiða 6284 tímar ókeypis. Byrjað varð sama ár við at grava fyri nýggjum hyli, men strílti gekkst. Men 31. mei



Er tað nakar einstakur sum kann verða nevndur í sambandi við svimjifelagið, so er tað Bobby Brockie, sum altíð hevur luttikið aktivt í felagsarbeiðinum.

undir heldur vánaligum umstøðum og í 1949 stongdi heilsu nevndin hylin í Gundadali. Hann var tá ikki í nýtuligari standi longur. Hann var vorðin ónossligur og ótíðarhóskandi, og tí var einki annað at gera, hóast hetta varð gjørt við ring um tannabiti. Støðið undir svimjifelagnum var við hesum burtur og var sostatt hilidið uppat við felagnum.

»Vit fara til arbeiðis . .«

Í ftróttatíðindi 1952 var tekning av nýggjum svimjihyli at siggja, og sagt varð frá at »nú fara vit til arbeiðis«... Roynt varð at skapa áhuga millum ftróttafólkið sjálvt, og var hetta 1959 va so nýggi hylurin í Gundadali vígdur. Um hetta skrivar ftróttatíðindi:

Sum indarar í Ganges

Hvat nýtsluni av hylinum viðvíkur, so fingu vit at siggja, at ongar grundir eru fyri at stúra, tí onganíð sá tú ánna Ganges so pinnpakkaða av indarum, ið har søkja sær heilsubót og sálarbót sum Gundadalshylin dag in eftir, at hann varð tikin í brúk. Fimm hylar kundu ikki rúma meir enn helvtini av tí skara av børnum og vaksnum, sum tolin stóðu 2-3 tímar og biðaðu eftir at sleppa úti.

Nýtt lív í felagið

Samstundis sum svimjáhugin við hesum nýggja og tíðarhóskandi hylinum vaks, vaks eisini hugurin at endurstovna gamla Havnar Svimjifelag.

Hetta varð gjørt og í fyribils starvsnevndina komu Poul E. Petersen, formaður, Robert Brockie, y, skrivari, Sára Hansen, Robert Mohr Poulsen og Sverri Trónd Hansen. Lív kom nú av álvara í felagið og skjótt var hildin stór svimjistevna í Gundadali við kappsvimjing, uppvising, umframt skemti og øðrum. Síðani hava javnan kappingar verið hildnar, og felagið hevur verið í Danmark og so muleiðis havt útlendskar gestir.

Kappingar

Í 1963 vóru danskir gestir í Føroyum og vitjaðu Havnar Svimjifelag. Tað var felagið Neptun. Okkara svimjarar stóðu seg manniliga og vunnu meginpartin av teim kappingum, sum vóru. Árið eftir bjóðaði Neptun av aftur og fóru tá 15 svimjarar úr Havn til Danmarkar at kappast. Har gekk á sama hátt. Havnar Svimjifelag kom heimaftur við sigrinum. Donsk bløð gjørdu óført burturúr vitjan Havnar Svimjifelags í Danmark, haðani vit hava tikið nøkur kut burturúr. Á somu ferð var eisini vitjað í Aars og somuleiðis svimjifelagið Sparta í Keypmannahavn. Úrslitið var tað sama allastaðni.

Á ólavsøku í 1965 vitjaði Sparta hendavegin og kappaðust teir móti Havnar Svimjifelag. Hóast okkara svimjarar stóðu seg væl, fór Sparta avstað við sigrinum hesaferð við 115 stigum móti 105.

Vikuna eftir stóð hetta at lesa í SOSIALINUM:

Svimjuhylurin má tekjast!

Seinasta leygardag var kappsvimjing í Gundadali, har Havnar Svimjifelag kappaðist við svimjifelagið »Sparta« úr Keypmannahavn. Sjálvt um Sparta var við yvirlutan, kann ikki annað sigast, enn at Havnar svimjifelag stóð seg manniliga.

Formaður Havnar svimjifelags Robert Brochie sigur frá, at teirra fólk bert kunnu iðka svimjing 5 mánaðar árliga, meðan tey, teir

skulu kappast við, kunnu royna seg alt árið. Hetta ber ikki til. Latum okkum fáa tak á hylin í Gundadali, so okkara fólk hava somu ikkindi sum onnur. Kann væl vera, vit kundu altíð fram svimjarar, tá kundu vit eisini mett seg við meistarar.

Lat okkum tekni hylin nú!

Ólavsøkidag kl. 14.30 verður at menn kappsvimjing í Gundadali, har eisini »Sparta« luttekur.

(Framhald á síðu 10.)



Bobby og Óli Debess.

